gult10 cyan10 magenta10 svart10



# Løgreglan í óføri

**Leygarnáttina stongdi løgreglan tríggjar náttklubbar í Havn. Ivi er sáddur um heimildina at gera hetta, og ein av náttklubbunum ætlar at krevja endurgjald. Yvirvøldin tigur**

NÁTTARLÍV
*Eyðun Klakstein*



*Leygarnáttina fingu tríggir náttklubbar í Havn vitjan av løgregluni, sum lat støðini aftur, men nú fær átakið hjá løgregluni løgfrøðisligt eftirspæl*

Leygarnáttina fingu tríggir náttklubbar í Havn vitjan av løgregluni sum kravdi, at náttklubbarnir vórðu stongdir og gestirnir settir á dyr.

Club 20, Tórshøll og Manhattan gjørdu eftir boðunum hjá løgregluni, men nú er ivi sáddur um heimildina hjá løgregluni at steingja náttklubbarnar, og í hvussu so er ein av náttklubbunum ætlar at krevja endurgjald.

– Vit mistu einar 100.000 krónur, umframt at vit fingu ringa umtalu av hendingini, og tí er tað klárt, at vit fara víðari við málinum og hugsa um eitt endurgjaldskrav, sigur Toni Dam, stjóri í Club 20.

Mouldi Manai, sum eigur Manhattan, sigur, at hann fer í fyrstu syftu ikki at krevja endurgjald.

– Eg fari at biðja løgregluna um eina frágreiðing um, hví teir stongdu Manhattan. Tá eg havi fingið hesa frágreiðing, kann eg taka støðu til eitt møguligt endurgjaldskrav, sigur Mouldi Manai.

## Gjørdu eftir boðunum

Tað var eftir klokkan eitt leygarnáttina, at løgreglan fór húsagongd í náttarlívinum í Havn. Tórshøll, Club 20 og Manhattan fingu greið boð um at lata aftur, og uttan fyri bíðaðu bæði løgreglumenn og hundar.

– Vit royndu at vísa á, at vit høvdu loyvi at hava opið, men tað nyttaði einki, og tí lótu vit aftur. Fólkini fóru friðaliga út, sigur Toni Dam í Club 20.

– Tað skal eisini sigast, løgreglumenninir vóru hampuligir. Teir komu ikki inn at rudda hølið, men bóðu okkum sjálvi lata aftur.

Mouldi Manai gjørdi eisini av, at lata síni høli aftur, tá løgreglan troppaði upp.

– Tað nyttar ikki at fara at stríðast við løgregluna, og tí lótu vit aftur, tá løgreglan bað okkum tað, sigur Mouldi Manai, sum rekur Manhattan.

Eitt sindur av ófriði var í sambandi við afturlatingina av náttklubbunum, men alt lagaði seg uttan nakran veruligan samanbrest.

## Loyvt at hava opið

Sambært tíðindunum í Útvarpi Føroya leygarkvøldið viðgekk løgreglan, at hon hevði gjørt eitt mistak við at lata Tórshøll og Manhattan aftur, tí hesi støðini høvdu loyvi at hava opið.

Sambært skeinkiloyvunum hava slík støð loyvi at skeinkja fríggjakvøld og leygarkvøld til klokkan 04.00. Hinvegin er ikki loyvt at hava dans ávísar dagar á árinum, og bæði Langi fríggjadagur og páskaaftan koma undir hesar avmarkingar. Hvørki Manhattan ella Tórshøll høvdu dans hetta kvøldið.

Hinvegin var dansur í Club 20, men her halda teir, sum reka dansistaðið, at løgreglan gjørdi eitt mistak leygarnáttina. Sambært teirra tulking av lógini er einki í vegin við at hava opið, og seinastu 13 árini hevur dansur verið í Club 20 eftir midnátt Langa fríggjadag, uttan at nakað er hent.

– Tað er vánaligt, at løgreglan soleiðis kemur á staðið og krevur, at vit lata aftur, tá vit hava loyvi at hava opið, sigur Toni Dam

## Løgreglan málleys

Týsdagin royndu vit at fáa eina viðmerking frá teimum avvarðandi innan løgregluna til hendingina leygarkvøldið, men hetta lat seg ikki gera. Vit fingu onga viðmerking til, hví løgreglan vildi hava støðini at lata aftur, og hvør hevði givið boðini um hetta.

Leiðarin á politistøðini í Havn, Jón Klein Olsen, var á fundi allan dagin, og vit kundu tí ikki sleppa at tosa við hann.

Mogens Nepper Christensen, fúti, hevur verið burturstaddur á páskum, og Finn Ougaard, varafúti, var ikki at hitta fyrrapartin í gjár.

# Bilar og tivoli á Tvøroyri



*Her, í ítróttarhøllini á Tvøroyri verður stórt tiltak um vikuskiftið. Fleiri bilasølur fara at vísa bilar fram og Lions Klubburin í Suðuroynni hevur tivoli, har peningurinverður latin í stuðuli til at keypa ein serútgjørdan buss til tey, sum búgva á Suðuroyar Ellis og Røktarheimi*

**Um vikuskiftið verður stórt tiltak í ítróttarhøllini á Tvøroyri.**

TILTAK
*Áki Bertholdsen*

Um vikuskiftið verður eitt stórt tiltak í ítróttarhøllini á Tvøroyri. Tá verður ein stór bilaframsýning í høllini, samstundis sum Lionsklubburin í Suðuroynni fer at hava tivoli við ymsum undirhaldi.

Tað er Nýggjársnevndin á Tvøroyri, sum skipar fyri framsýningini.

Seks bilasølur fara at vísa bilar fram, tær eru Reyni Service, Nordbil, Berg Motors, Wenzil Petersen DB Bilar og Meinhardt Arge og tilsamans hava teir fulla høll av bilum.

Framsýningin er opin fríggjadagin frá kl. 18-22, men leygardagin og sunnudagin er opið frá kl. 14-20.

## Tivoli

Samstundis, sum bilaframsýningin, er eisini Tivoli við ymsum til undirhalds í skúlahøllini í Trongisvági. Tað er Lions Klubburin í Suðuroy, sum skipar fyri.

Har verður m.a. hoppiborg, og tombola av ymsum slag, bæði við kakum, mati, bamsum og kanska øðrum við. Leygardagin koma eisini klovnar úr Havn at skemta fyri teimum yngru.

Peningurin, sum kemur inn, verður latin í stuðuli til at til ein buss, sum Suðuroyar Ellis- og Røktarheim ætlar at keypa.

Tey, sum búgva á Ellisheiminum hava tað ógvuliga trupult, tá ið tey skulu onkustaðni, tí ongin bilur er í oynni, sum er serútgjørdur til at flyta fólk við, sum eru illa fyri og kanska sita í rullustóli.

Men nú er so ætlanin at útvega ein. Ellisheimið hevur við ymsum tiltøkum roynt at savna inn pening fyri bussin og nú hevur Lions Klubburin í Suðuroynni so eisini gjørt av at stuðla tiltakinum.

# Ein blá ein



*Estlendska ferjan, Scania, siglir nú millum Klaksvík og Fuglafjørð, og tænastan er betrað munandi, hóast seinkingar hava verið fyrstu dagarnar*

**Dúgvan skiftir lit, áðrenn hon verður sett aftur í sigling um Lorvíksfjørð. Øll strandfaraskipini skulu framyvir vera blá**

SAMFERÐSLA
*Eyðun Klakstein*

Tá strandfaraskipið Dúgvan um mánaðarskiftið fer aftur í sigling um Lorvíksfjørð hevur hon fingið nýggjan lit.

Strandfaraskipini skulu framyvir vera blá og hvít, og tey verða málað, so hvørt tey skulu í dokk. Fyrsta stóra strandfaraskipið, sum skiftir lit, verður Dúgvan, sum í løtuni er til umvælingar á skipasmiðjuni á Skála.

Nýggi Teistin, sum fer í sigling um nakrar vikur, er eisini bláur, og tá Smyril fer í dokk í mai mánaði verður størsta strandfaraskipið eisini málað blátt. Í løtuni er tað bara Ritan, sum er í sigling við nýggja bláa litinum hjá Strandferðsluni.

## Scania siglir

Skírishósdag fór ferjan Scania í sigling um Lorvíksfjørð, og stóra estlendska ferjan hevur røkt siglingina um páskirnar.

Við Scaniu hava tey, sum ferðast um Lorvíksfjørð, fingið munandi betri tænastu, tí Scania tekur nógv fleiri bilar enn bæði Dúgvan og Ternan. Scania tekur 80 bilar og 400 ferðafólk.

Scania hevur tó havt trupulleikar við at hildið ferðaætlanina, og smærri seinkingar hava verið fleiri av døgunum.

Scania siglir millum Klaksvík og Fuglafjørð, og hon røkir hesa farleið til Dúgvan fer aftur í sigling um mánaðarskiftið.

gult11 cyan11 magenta11 svart11



# Spírar framføra Agathu Christie í Sjónleikarhúsinum

**Mánakvøldið varð nýggjur krimileikur framførdur í Sjónleikarhúsinum í Havn. Tað er nýggi leikbólkurin Spírar, sum framførir leikin Músafellan, ið kendi enski høvundurin Agatha Christie hevur skrivað**

SJÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*

Sjónleikarhúsið í Havn var væl meira enn fullsett mánakvøldið, tá ein nýggjur sjónleikur varð frumframførdur. Músafellan eftir Agathu Christie varir tveir tímar við einum steðgi.

– Hetta er ein krevjandi leikur, tá hugsað verður um, at bara tríggir av leikarunum hava roynt at staðið á palli fyrr, sigur Aksel Joensen.

Aksel Joensen er formaður í leikbólkinum Spírar, ið var stovnaður fyri einum ári síðani og stendur fyri framførsluni av Músafelluni. Aksel er eisini ein av leikarunum, sum fara at standa á palli komandi vikurnar.

– Vit hildu at sjónleikarumhvørvið var eitt sindur deydligt, og tí fóru vit undir at stovna ein nýggjan leikbólk, og hetta er okkara fyrsta framleiðsla, sigur Aksel.

Átta leikarar eru við í leikinum. Teir eru Aksel Joensen, Sólva Jónsdóttir, Beinta Danielsen, Hanna Flóvinsdóttir, Hilmar Joensen, Gutti Winther, Eyðfinn Steensen og Ronnie Poulsen.

Harumframt eru fleiri fólk, ið standa handan leiktjaldið. Jákup Veyhe er leikstjóri, Herleif Hammer er framleiðslustjóri, Gunnvá Zachariasen er hjálparframleiðslustjóri, meðan Turpin N. Djurhuus og Hallur Hjalgrímsson standa fyri palli og ljósi.

*Sjónleikarhúsið í Havn verður komandi vikurnar karmur um krimileikin Músafellan eftir enska høvundan Agathu Christie*



Hendingarnar í leikinum fara fram í London beint eftir kríggið í 1952. Eitt morð er framt á gøtuni. Gerningsmaðurin verður eftirlýstur í útvarpinum.

Handlingin fer mest fram á einum gistingarhúsi uttanfyri London. Har koma fleiri fólk, ið øll passa til lýsingina av drápsmanninum. Tað er uppgávan hjá løgreglumanninum á staðnum at finna tann rætta persónin.

Leikurin verður framførdur hvønn dag til og við mánadagin 23. apríl. Tá verður Músafellan troðka burtur av marknaðardegnum hjá húsinum. Leikurin verður tó tikin uppaftur eina viku seinni. Aksel Joensen sigur, at leikurin verður á skránni so leingi áhugi er fyri honum.

## FISKIVINNUTÍÐINDI

# Fiskimálaráðharrin leggur upp til aðalorðaskifti



*Jørgen Niclasen*

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Fiskivinnan skal vera enn meira umsetilig, fiskivinnan skal ikki hava stuðul, fiskivinnan skal klára seg sjálva, fiskivinnan skal laga seg eftir tí tilfeingi vit hava og flotin skal laga seg eftir teimum veiðumøguleikum hann hevur. Hetta eru lyklaorð í eini drúgvari frágreiðing, sum Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri og umsiting hans hevur gjørt um fiskivinnuna í Føroyum í framtíðini. Frágreiðingin varð almannakunngjørd í gjár og ætlanin er at tingið skal hava eitt aðalorðaskifti um ein greiðan fiskivinnupolitikk. Frágreiðingin hjá fiskimálaráðharranum skal nýtast sum grundarlag fyri hesum orðaskifti.

– Í samgonguskjalinum stendur, at ein greiður fiskivinnupolitikkur skal orðast. Hetta er tað sum vit hava gjørt, sigur Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri.

- Stórar broytingar eru hendar seinastu árini innan føroysku fiskivinnuna og eisini til tað betra, men enn eru vit ikki komin á mál. Áðrenn 1987 var frítt at fiska undir Føroyum, síðan komu veiðuloyvini, í 1994 fingu vit kvotuskipanina og í 1996 fingu vit fiskidagaskipanina. Hyggja vit eftir teimum seinastu tíggju árunum, so síggja vit, at fiskaprísurin í meðal er hækkaður út seks krónum upp í 11 krónur, tá hugsi eg um prísin í fjør. sigur Jørgen Niclasen.

- Heimaflotin veiðir í dag fyri eina milliard. Fjarskipaflotin veiðir fyri millum 600-700 milliónir. Men langfaraflotin gevur meira avkast og er betur førur fyri at endurnýggja seg. Ein setningur er at fáa heimaflotan at geva betri avkast. sigur Jørgen Niclasen.

Lesið meira á síðu 27

Atlantic Airways

**Søkir eftir húsum í Vágum**

Atlantic Airways søkir eftir einum húsi í Sørvági ella nærhendis til leigu í fýra mánaðir, frá juni til september, møguliga longri. Húsið skal vera í góðum standi, hava innbúgv, hava fýra kømur og tvey baðirúm. Tørvur er á húsinum sum skjótast.

Ynskir tú nærri upplýsingar, ring á tel 34 10 00 til Kent L. Christensen

ATLANTIC AIRWAYS
Tel 34 10 00 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo